## Amerikanarar ivast

Júst sum Barack Obama hevur gjørt av, at USA skal skerja sítt CO2-útlát fyri at avmarka hitavøksturin á jørðini, eru fleiri av hansara landsmonnum farnir at ivast í, at tað er virksemið hjá mannættini, sum er orsøk til broytingarnar í veðurlagnum. Ein nýggj meiningakanning hjá Washington Post og sjónvarpinum ABC vísir, at 72 prosent av amerikanarunum trúgva vísindini, tá hon sigur, at tað er vorðið heitari á jørðini, og at mannættin hevur skyldina. Tað ljóðar kanska av nógvum, men fyri einum ári síðani høvdu 80 prosent ta somu áskoðanina, skrivar Washington Post.



## Álopsmenn ákærdir

Ákæruvaldið í Pakistan hevur ákært sjey menn í sambandi við tað blóðuga yvirgangsálopið í indiska býnum Mumbai fyri einum árti síðani. Allir nokta seg sekar. Myndugleikarnir siga, at teir sjey hava tilknýti til tann víðgongda felagsskapin Lashkar-e-Taiba. Menninir hava sitiði varðhaldi í fleiri mánaðir, og millum teirra er Zakiur Rehman Lakhvi, sum sambært pakistonsku myndugleikunum var høvuðsmaðurin aftan fyri álopið á tvey gistingarhús og eina jarnbreytarstøð í Mumbai, og sum kostaði 166 mannalív.

# Nýtt og gamalt á Vónini

**- Tað ræður um, at fiskiveiða er burðardygg og fer so væl við umhvørvinum sum gjørligt, sigur Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini**

VINNUTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá sjálvt vinnutingið á Vónini varð liðugt seinasta fríggjadag, var rundvísing á virkinum, har fólk høvdu høvi at síggja bæði skrivstovur, framleiðsluhallir og hylin, sum í sínari tíð varð bygdur til royndir við trolreiðskapi.

Hjalmar Petersen segði, at Vónin liggur inni við einari vørugoymslu, sum hevur eitt leypandi virði av umleið 30 miljónum krónum.

Hann vísti á, at umráðandi er at gera góð, løtt og sterk trol, soleiðis at oljunýtslan hjá skipum ikki verður størri enn neyðugt.

- Tað ræður um, at fiskiveiða er burðardygg og fer so væl við umhvørvinum sum gjørligt.

Hjalmar Petersen nevndi, at eitt nú skipini, sum fiska makrel, tóva við umleið 6-7 míla ferð, og í slíkum føri er ikki minst umráðandi, at reiðskapurin ikki er ov tungur.

### Stórir meskar

Í stóru framleiðsluhøllini vísti stjórin á Vónini okkum eitt nú stóru meskarnar, sum eru í eitt nú pelagisku trolunum.

- Meskarnir fremst í einum makreltroli eru upp í 64 metrar langir. Hetta kann tykjast løgið, men hesir hava til uppgávu at reka fiskin, sum at enda møðist og dettur aftur í trolið.

Hesa løtu, vit stóðu við meskarnar, visti Sigurd Simonsen, fyrrverandi skipari, sum eisini er borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, eina áhugaverda søgu at siga.

Saman við Olafi Olsen, fyrrverandi skipara og reiðara, mintist Sigurd aftur á tíðina, tá hugskotið um at veksa um meskarnar fremst í trolinum tók seg upp.

- Eg minnist í 1976-1977, tá vit fóru at eksperimentera við størri meskum. Eg var tá skipari við Leivi Øssurssyni.

Sigurd segði, at hann minnist, tá meskarnir vóru 80 sentimetrar.

- Sum hvørt, sum hetta vísti seg at rigga, vuksu meskarnir upp í ein metur, tveir metrar, tríggjar metrar og so víðari, til teir at enda eini tvey ár seinni vóru komni upp í einar 16 metrar.

Olaf Olsen samtykti og segði seg eisini minnast hesa tíðina væl.

- Jú, vit eiga avgjørt ein part av æruni fyri, at meskarnir gjørdust so stórir, sum teir eru dag og soleiðis eisini í royndunum at menna slíkan trolreiðskap, segði Sigurd Simonsen brosandi.



*- Jú, vit eiga avgjørt ein part av æruni fyri, at meskarnir gjørdust so stórir, sum teir eru dag og soleiðis eisini í royndunum at menna slíkan trolreiðskap, segði Sigurd Simonsen, sum her hevur Olaf Olsen við sína lið*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini, segði, at leypandi vørugoymslan hjá felagnum hevur eitt virði av 30 miljónum krónum*
Mynd: Vilmund Jacobsen



okkara fiskiskipaflota.

Fyrrverandi reiðarin segði, at meðan fiskiflotin samanlagt hevur eitt stórt hall í 2008, hava fiskiloyvini hjá hesum sama flota eftir øllum at døma eitt virði av fleiri hundrað miljónum krónum.

- Hvussu hongur hetta saman? spurdi Olaf Olsen.

Vinnulívsfólk, sum vóru komin saman til vinnutingið hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag, tóktust rímiliga samd um, at tørvur er á einum blað, sum í størri mun og meira ítøkiliga viðger føroyska vinnu.

### Áhugavert tilfar

Høgni Rasmussen, stjóri á Sansir, ið sum nevnt verður útgevari av Vinnu, segði seg hava sæð ymiskt av tí tilfari, sum verður í hesum fyrsta blaðnum, og hann segði seg onga løtu ivast í, at hetta verður eitt fjølbroytt og áhugavert blað – og ein spennandi roynd í føroyska blaðheiminum.